Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Malta, Hirtshals

Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur, tá skúlarnir byrja.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.

Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
Samkoman Malta
í Hirtshals

Føroyingar í Noregi

Føroyingar og fólk við tilknýti til Føroyar hittast til óformligan hugna fyrsta leygardag í mánaðinum á Kafé Asylet, Grønland 28, í Oslo.

Norsk-Færøysk Lag skipar fyri tiltakinum.

Felagið hevur
tlf. +47 22 67 48 29

Føroyingafelagið í Aalborg

Lille Kongensgade 10B
9000 Aalborg
Opið er mikukvøld kl. 19–22, fríggjadag frá kl. 17–19 og leygarkvøld frá kl. 22–03. Onnur tiltøk verða lýst í felagsblaðnum.

Føroyingafelagið í Árhus

Vestergade 48 D,
8000 Arhus C
Áarstova, húsið er opið mánad.-hósd. kl. 16-18.

Fríggjakvøldið kl. 21-03 atgongumerkið fyri ikki limir 10 kr.

Føroyskur skúli fyri børn leygardag, líka vikur, frá kl. 11

Før. dansur er 2. hvørt fríggjakvøld.

Sertiltøk: Hoyrið telefonsvararan á tlf. 86-180604.



Vika 31 - 30. juni

Vinnaratøl: **9 - 11 - 27 - 32 - 40 - 41**
Eykatøl: **5 - 22 - 39**

6 vinnaratøl:	**Eingin vinnari**
5 vinnarat.+1 eykat.:	**66.883,- kr.**
5 vinnaratøl:	**5.477,- kr.**
4 vinnaratøl:	**131,- kr.**
3 vinnarat.+minst 1 eykat.:	**43,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Komandi filmirnir HAVNAR BIO

FIMTA ELIMENTIÐ

Dynamiskur og myndakendur vínblandingur. Tøknifrøðiligt fjølbroytni, og ógvuliga skemtingarsom framtiðarlýsing um kærleika og yvirliving, mannligar og kvinnuligar hetjur, og, sjálvandi, tað góða mótvegis tí ónda.

Sjálvur sigur Luc Besson, filmsleikstjóri, um „Fimta Elementið":

– Skal eg lýsa filmin, er hann 1/3 „Brazil", 1/3 „Star Wars" og 1/3 „Jacques Tati". Skálkurin í filminum, Gary Oldman, lýsir beinleiðis filmin sum „Star Wars" í sýru.

Heitið á filminum, Fimta Elementið", skal setast í samband við elementini í grikskum, alkymistiskum siði: Jørð, luft, eldur og vatn. Fýra element, sum samanløgd verða til fimta elementið: Liv.

Leikstjórin Luc Besson lýsir hetta lívið sum positiva lívið, positiva orkan, ið veitir livandi verum møguleikan at tosa, iðka ítrótt, hugsa o.s.fr.

Í filminum fantaserar Luc Besson um tilveruna av eini kontrast til lívgevandi, positivu orkuna. Megir í stríð hvør við aðra, lítið lívgevandi, myrkar og oyðandi megir, sum hava allan óndskap í sær.

Gongdin í filminum fer fram í 23. øld, tá menniskjan hevur breitt seg munandi, og samstundis eisini positiva lívið, heilt út millum stjørnurnar. Harradømi okkara er sjálvandi stórur trupulleiki hjá óndu maktunum, sum merkja positiva lívið sum eitt kvørkratak. Óndu maktirnar eru vorðnar alt veikarl, og eru á mørkinum til oyðing. Tær gera mótstøðu; vilja oyða alt lív, øll djór, hvørja grønsak, hvørt menniskja. Men óndu maktirnar hava ein trupulleika, tí bert 5.000 hvørt ár letur rúmdin seg eina lítla løtu upp, soleiðis at atgongd er til positivu dimensjónina.

Í byrjanini av filminum síggja vit, hvussu menniskjað á sinni megnaði at vinna á tí ónda.

Høvuðsleiklutirnar hava Bruce Willis og tann heldur ókenda Milla Jovovich.

Fríggjadagur 01.08. kl. 19⁰⁰ Fríggjadagur 01.08. kl. 23³⁰
Leygardagur 02.08. kl. 19⁰⁰ Leygardagur 02.08. kl. 23³⁰
Sunnudagur 03.08. kl. 19⁰⁰ Sunnudagur 03.08. kl. 23¹⁵

★ BIO KIOSKIN ★
Heitt Pop-Corn – Coca Cola - Góðgæti - Premier ís o.m.a.

HAVNAR BIO
★ Tlf. 11956 ★

Fríggjadagur 01.08. kl. 21¹⁵ Leygardagur 02.08. kl. 21¹⁵
Sunnudagur 03.08. kl. 21¹⁵



Fríggjadagur 01.08. kl. 23¹⁵ Leygardagur 02.08. kl. 23¹⁵
Sunnudagur 03.08. kl. 23⁰⁰

Forsølan til »BARBARU« er byrjað



Fríggjadagur 01.08. kl. 21⁰⁰ Leygardagur 02.08. kl. 21⁰⁰
Sunnudagur 03.08. kl. 21⁰⁰

Fríggjadagur 01.08. kl. 18⁴⁵ Leygardagur 02.08. kl. 18⁴⁵
Sunnudagur 03.08. kl. 18⁴⁵

KOMANDI FILMAR:



FRUMSÝNING fríggjadagin 08.08.